TB-Dráttur 3-1 (25-18, 24-26, 25-15, 25-15):

# TB vann við nýggjum venjara

**Samstarvið millum TB og italska venjaran Emanuele Leoni gjørdist ikki langt. Venjarin varð uppsagdur aftaná dystin móti ÍF næstsíðsta sunnudag. Uppsøgnin man tó ikki hava nervað liðið serliga nógv, tí sunnudagin vunnu tær 3-1 móti Drátti**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Tá ein venjari verður uppsagdur mitt í einum kappingarári, kemst tað sum oftast av, at úrslitini ikki hava staðið mát við vónirnar. Men vantandi úrslit vóru ikki grundin til, at flogbóltsdeildin hjá TB næstsíðsta sunnudag uppsegði samstarvið við italska venjaran Emanuele Leoni.

TB hevur vunnið allar dystirnar higartil í kappingini, men samstarvstrupulleikar førdu til, at venjarin varð uppsagdur. Virgar Dalsgaard er nú fyribils venjari hjá TB, og hann stóð á odda fyri liðnum, sum sunnudagin vann 3-1 móti Drátti. Virgar sigur, at tað sjálvandi er spell, at samstarvið er hildið uppat, men at tað ikki kundi vera øðrvísi.

TB fer nú at leita eftir einum nýggjum venjara. Hann verður helst eisini útlendskur, tí føroyski marknaðurin er ikki serliga stórur, og so slettis ikki, tá liðið, sum skal venjast, er úr Suðuroynni.

Í TB vóna tey at finna onkran, sum eisini kann leika við liðnum. Men kravið er, at ein slíkur leikari er betri enn teir føroysku, tí annars er einki endamál í at hava hann á liðnum.

Annars vísir Virgar Dalsgaard eisini á, at tað kann gerast trupult at fáa nakran venjara nú. Kappingarnar niðri á evropeiska meginlandinum eru í gongd, og flestu venjarar hava sáttmála við síni feløg. Eftir ársskiftið eru møguleikarnir kanska størri, heldur hann.



*Undan kappingini var lagið gott á Tvøroyri, tá nýggi venjarin kom til landið, men eftir fimm sigrar á rað og sigur í Fleyr-kappingini hevur venjarin kortini fingið sekkin. Samstarvstrupulleikar vóru orsøkin, og nú skal TB so leita eftir nýggjum venjara*

### Tryggur sigur hóast alt

Við uppsøgnini av venjaranum segði TB eisini farvæl við annan av útlendsku leikarunum hjá sær, Lili Popescu úr Rumenia. Hin útlendski leikarin, Maja Popovic úr Bosnia, heldur kortini fram í TB, og hon var við, tá Dráttur sunnudagin vitjaði í Trongisvági.

Og tað merktist ikki serliga nógv á liðnum, at venjarin var farin. Sjálvandi sást tað aftur, at Lili Popescu ikki var við. TB kundi ikki avgera álopini so skjótt, sum tær fyrr hava gjørt, men av tí sama bleiv tað meira spæl og tí meira undirhaldandi hjá teimum, sum hugdu.

Og TB var eisini klárt betri fyri enn Dráttur. Eftir at hava tapt fyrsta sett 25-18 eydnaðist tað kortini Drátti at vinna næsta settið 26-24, men restina av dystinum var næstan eingin spenningur, og TB vann bæði triðja og fjórða sett 25-15.

Við hesum kom TB upp á tíggju stig, og leiðslan er enn trygg. Næsti dystur er á heimavølli móti Mjølni, sum er um at koma fyri seg, og um tvær vikur skulu TB-kvinnurnar so spæla úti móti ÍF, sum í løtuni er nærmasti kappingarneyti hjá TB. Eydnast tað eisini TB-kvinnunum at vinna hesar báðar dystirnar, hava tær vunnið sær eina stóra leiðslu, eisini sjálvt um stigini verða býtt í helvt aftaná ársskiftið.

Fleyr-ÍF 1-3 (25-23, 16-25, 13-25, 24-26):

# Ruðuleiki tá ÍF vann móti Fleyr

**Síðsta orðið er kanska ikki sagt í kvinnudystinum millum Fleyr og ÍF, sum ÍF vann 3-1. Ein feiluppstilling frá ÍF, sum eingin legði merki til fyrr enn seinni, elvdi til ruðuleika, og møguliga skal dysturin spælast av nýggjum**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Kvinnurnar hjá ÍF vunnu sunnudagin 3-1 í Gundadalshøllini móti Fleyr. Ein rímiliga uppiborin sigur til liðið, sum spældi betur samanlagt. Men dysturin fekk ein óhepnan enda. Tað vísti seg nevniliga, at ÍF í fjórða setti gjørdi eina feiluppstilling ella við øðrum orðum roteraðu skeivt. ÍF-kvinnurnar høvdu miðskeiðis í settinum spurt seg fyri hjá dómaraborðinum og høvdu síðani gjørt eftir teirra boðum, men seinni í settinum, tá støðan var 22-20 til ÍF, gjørdi dómaraborðið so vart við, at uppstillingin var skeiv, sum hon eisini var. Trupulleikin var bara, at fleiri bóltar vóru longu spældir síðani villan varð gjørd, og øll vóru rættiliga ørkymlað av støðuni. ÍF misti nøkur stig, Fleyr fekk nøkur stig, og so varð spælt víðari. ÍF vann settið 26-24 og harvið dystin 3-1.



*ÍF vann dystin á Fleyr sunnudagin, men orsakað av einum uppstillingsfeili hjá ÍF í fjórða settinum, er seinasta orðið um dystin kanska ikki sagt enn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Men eftir hvat skilst, er síðsta orðið kanska ikki sagt. Tað frættist, at Fleyr hevur kravt nýggjan dyst, men tað er ikki eydnast okkum at fáa hesi tíðindini váttað við vissu.

Um dystin er annars at siga, at hann var rættiliga javnur. Fleyr spældi væl, serliga niðri á gólvinum, og tær vunnu fyrsta sett 25-23. ÍF, sum alt árið hevur havt tann trupulleika, at spælið er ov óstøðugt, vann so tey bæði næstu settini rættiliga trygt 25-16 og 25-13. Í fjórða setti hendi so tað, sum elvdi til ruðuleika, og síðsta orðið er kanska ikki sagt enn.



Fram-Mjølnir 3-1 (25-17, 25-20, 14-25, 27-25):

# Fram heldur fram

**Oddaliðið Fram vann móti Mjølni, men teir fingu ein rættiligan hvøkk í triðja setti, sum teir taptu stórt**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Higartil hevur tað ikki verið tann stóri slingurin í valsinum hjá Fram, sum enn hevur fult stigatal í bestu mansdeildini í flogbólti.

Sunnudagin vann Fram móti Mjølni, men heldur ikki hesaferð eydnaðist tað teimum at vinna øll settini, og tað er bara enn ein ábending um, at sjálvt um Fram er ovast á stigatalvuni, so eru nógv av liðunum rættiliga jøvn.

Fram vann tvey tey fyrstu settini 25-17 og 25-20, men so gekk heilt galið hjá oddaliðnum, og Mjølnir vann triðja sett ikki minni enn 25-14. Men havnarmenninir fótaðu sær aftur og vunnu fjórða sett 27-25, og nú er lagt upp til stórdyst næsta leygardag, tá Fram skal til Sørvágs at spæla móti SÍ, sum enn er beint í hølunum á teimum.


*Mølnir gav Fram ein framman á, men hóast lítla skelkin, so eydnaðist tó Fram at vinna dystin, og eru teir framvegis á odda í bestu mansdeildini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÍF-SÍ 1-3 (24-26, 25-23, 19-25, 17-25):

# SÍ heldur tørn

**Hvørgin av pørtunum vóru serliga væl nøgdir við dømingina sunnudagin, men hon fekk onga avgerandi ávirkan á dystin, tí munurin á liðunum var ov stórur**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

SÍ vann ein uppibornan sigur á nýggja ÍF-liðnum á Kambsdali í einum dysti, sum varð merktur av ivasamum dómaraavrikum.

Hvørki sørvingar ella fuglfirðingar vóru serliga væl nøgdir við dømingina, men tað er sjáldan, at dømingin fær avgerandi ávirkan á dystin, og tað fekk hon heldur ikki hesaferð. Til tað var munurin á liðunum ov stórur.

SÍ er eitt av toppliðunum, meðan ÍF er niðast við ongum stigi, so í so máta var úrslitið ikki óvæntað. Og tað er eisini munur á, hvussu høgt liðini stíla í ár. Meðan SÍ hevur styrkt nógv um liðið og ætlar at gera seg galdandi heilt har frammi, eru fuglfirðingar farnir at byggja eitt nýtt lið upp, sum ætlandi skal halda fram í nøkulunda sama líki í fleiri ár frameftir. Fleiri av leikarunum hava unglingaaldur og spæla eisini á unglingaliðnum, sum um vikuskiftið vann Fleyr-kappingina fyri yngru deildirnar. Her vann ÍF eisini kappingina hjá dreingjum 14 ár, so framtíðarútlitini eru bara góð.

### Leiklutirnir býttir um

Sunnudagin vóru leiklutirnir teir øvugtu av tí, teir vóru í fjør. Tá var tað ÍF, sum lá heilt frammi í oddinum og eisini vann føroyameistaraheitið, meðan SÍ lá einsamalt í botninum. SÍ hevði eisini sigurin uppibornan, men teir í ÍF vóru ikki serliga hepnir við tað, at tveir av leikarunum hjá teimum fingu skaða undir dystinum. Tvey tey fyrstu settini vóru sera jøvn, og liðini vunnu eisini hvør sítt.

Triðja og fjórða sett vóru eisini rímiliga tøtt, men tey vann SÍ 25-19 og 25-17, og so var dysturin avgjørdur.

Í løtuni líkist ÍF einum niðurflytara, men teir hava ikki so nógv at óttast kortini, tí næstbesta liðið hjá teimum hølvar alt av í 1. deild, so niðurflyting kemur neyvan upp á tal. Hjá SÍ var tað týdningarmikið at vinna beint áðrenn oddadystin næsta leygardag móti oddaliðnum Fram. Vinna sørvingar tá, eru teir javnir í stigum við Fram, og so er spenningurin fullkomin.

### Støðan, meistaradeild kvinnur

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| TB | 5 | 4 | 0 | 15 | 2 | 13 | 10 |
| ÍF | 5 | 3 | 4 | 11 | 9 | 2 | 6 |
| Dráttur | 5 | 2 | 3 | 9 | 10 | -1 | 4 |
| Mjølnir | 4 | 1 | 3 | 6 | 10 | -4 | 2 |
| Fleyr | 5 | 1 | 4 | 5 | 14 | -9 | 2 |

### Støðan, meistaradeild menn

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Fram | 5 | 5 | 0 | 15 | 7 | 8 | 10 |
| SÍ | 5 | 4 | 1 | 13 | 5 | 8 | 8 |
| Mjølnir | 5 | 2 | 3 | 9 | 11 | -2 | 4 |
| Fleyr | 4 | 1 | 3 | 6 | 9 | -3 | 2 |
| ÍF | 5 | 0 | 5 | 4 | 15 | -11 | 0 |

